# 200 koppaðu Reykjavík



**Tá 200 fóru á pallin í Grand Rock sunnunáttina, var tað fyrstu ferð, at ein føroyskur bólkur spældi á Iceland Airwaves festivalinum, og tað kundi ikki havt gingið betur**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Sambært almenna festival tíðindablaðnum á Iceland Airwaves var konsertin hjá 200 á Grand Rock í Reykjavík fantastisk, tíðindablaðið skrivar millum annað "The crowd went absolutely apeshit" beinleiðis umsett, so fóru fólka fullkomiliga apulort, hetta merkir at áskoðarafjøldin gekk fullkomiliga amokk.

### Fyrstu føroyingar á Airwaves

Sum tann fyrsti føroyski bólkurin nakrantíð á Iceland Airwaves, spældu 200 á rokkpallinum á festivalinum, og fóru á pall um eitt tíðina sunnunáttina. Grand Rock var á tremur við fólki. M.a. tí festival tíðindablaðið, hevði sama dag viðmælt 200, og valt teirra konsert út sum eina av sjey konsertum á festivalinum, ið var alneyðug at síggja.

### Nógvir fjølmiðlar

Jónas Bloch Danielsen, gjørdi ljóð hjá 200, og hann sigur frá, at har var ein stórur riðil av myndamonnum og fjølmiðlafólki alla konsertina hjá 200. "Nógv fólk stóð við blokkum og tók notatir, so har vera nokk meira enn hetta eina ummælið" sigur royndi føroyski ljóðmaðurin.

Niels Arge Galán sangari í 200, var ein glaður maður, tá vit fingu orð á hann mánamorgunin. Hann segði, at hann var ovfarin av hvussu væl teir vóru móttiknir. Tað var løgið at koma á pallin, og seta útgerðina upp, meðan myndamenn stóðu og tóku myndir. "Fólk var eisini ræðuliga við uppá tað" fortelur Niels. Hann heldur eisini sjálvur, at konsertin gekk væl.

### Týdningarmiklasta konsert nakrantíð

Eingin ivi er um, at hetta er gott fyri føroyskan tónleik, tí Airwaves er ikki bert tann mest týdningarmikli íslendski tónleikafestivalurin, men eisini ein sýnisgluggi úteftir. Sera nógv útlendsk tíðindafólk, og talentskótar á Airwaves, ið hevur fingið navn fyri at vera ein sýnisgluggi inn í tónleikaframtíðina.

Niels er heldur ikki í iva "Hetta er uttan iva tann mest týdningarmikla konsertin, sum vit hava spælt". Fyrsta fløgan hjá bólkinum 200% seldi sera væl í Íslandi, men hóast "Viva la Republica" fæst í tveimum av teimum trimum stóru fløguhandlunum í Reykjavík, so er lítið og einki gjørt fyri at selja hana. Men nú skal vend koma í. Bólkurin ætlar sær at royna, at fáa eitt íslendskt felag at geva hana út á íslendska marknaðin. Fløgan hevur selt sera væl í Føroyum, og hevur nógv breiðari popgóðsku enn tann fyrra, og tí átti hetta at verið møguligt.

### Høvdu bíðað eftir 200

Bæði Niels og Jónas vóru ovfarnir, av at 200 ikki kundi ganga á gøtuni í Reykjavík, uttan at fólk kendu teir aftur og komu at práta við teir. Jónas sigur: "Eg visti slettis ikki, at teir vóru so kendir.". Nógv fólk mintust teir aftur frá seinastu konsertferð í Íslandi, sum var tá 200% varð útgivin. Fólk søgdu, at tey høvdu bíðað eftir, at 200 kom aftur, og allastaðni bólkurin kom, vistu fólk at 200, tað var punkbólkurin úr Føroyum.

Umframt Airwaves spældu 200 tríggjar aðrar konsertir vikuskiftið fyri, tá hitaðu teir upp fyri stóra íslendska poppnavnið Trabant, á best umtókta spælistaðnum í Reykjavík Nasa, spældu í fløguhandlinum Smekkleysa, og á tí sera eksklusivu barrini Sirkús. Jónas sigur seg ikki ivast í, at 200 skjótt fara aftur til Íslands.

# Maria Guttesen heilt einsamøll

Hósdagin 27. oktober hevur Maria Guttesen konsert í Deli de Luxe í Århus. Maria hevur seinastu tíðina spælt konsertir saman við Lenu og Amalie Riis, undir heitinum "3 original blondes". Men hóskvøldið fer hon einsamøll á pallin.

Hetta er fyrsta solokonsert hjá føroysku songkvinnuni, eftir at hon í nøkur ár hevur staðið á odda fyri bólkinum Divided Minds.

Á konsertini fer Maria at framføra egin løg, ið Lene Drachmann hevur gjørt orð til. Maria fer um stutta tíð í upptøkuhølið at spæla nýggja fløgu sína inn, ið eftir ætlan kemur út til várs.

Á www.mariaguttesen.dk ber til at taka niður løg hjá Mariu, og eitt nýtt lag verður lagt á heimasíðuna hvønn mánað. Konsertin við Mariu Guttesen hóskvøldið byrjar kl 21, og tað er ókeypis atgongd í Deli de Luxe ið liggur í M.P. Bruunsgade 42.

**nud**

# Lena á Tjecklistanum

Danska svarið uppá 15 tær bestu, Tjecklisten hevur hesa vikuna eitt føroyskt eykalag, tað er "Step on the gas" hjá Lenu, sum seinastu vikurnar er vorðið eitt heilt nógv spælt lag í donskum útvarpi. Lagið er fyrsta lag á nýggju útgávuni av "Can't erase it", sum varð givin út á danska marknaðin mánadagin.

Fløgan hevur verið fløgan hesa vikuna á Sky Radio. Sky Radio er ein av teimum størru komersiellu útvarpsrásunum á danska marknaðinum. Men eisini á stóru almennu rásunum P3 og P4 hevur "Step on the gas" verið nógv at hoyrt. Tjecklisten er júst á P3. Hetta er ein sera vælumtókt hitlista sending, har lurtarin atkvøður og soleiðis avger raðfylgjuna. Fyrr hava Guðrun Sólja Jacobsen, Gunnar og Teitur Lassen roynt seg á listanum.

20 løg eru á listanum og hvørja viku eru hópin av eykaløgum, hesa vikuna eru ikki færri enn 16, so tað er eitt fitt petti eftir inntil Lena er heilt innanfyri, men eingin ivi er um, at hetta er eitt herðaklapp.

Til ber at hoyra sendingina og atkvøða á heimasíðuni hjá listanum, til ber at atkvøða til týsdag, so í dag er síðsta freist: http://www.dr.dk/p3/tjeklisten/index.asp

**nud**

# The God Channel vitjar í Føroyum

**Óivað største kristna sjónvarpsrásin í Europa, The God Channel, kemur á vitjan í Føroyum. Eini 10 til 15 túsund føroyingar síggja rásina**

MIÐLAR
*dagfinn@sosialurin.fo*

Altjóða rásin The God Channel, ið óivað er hin største í Europa, vitjar í Føroyum næstu dagarnar. Rásin sæst á Televarpinum, á parabol og á alnetinum á www.god.tv

Rásin sendir 24 tímar um samdøgri og á Televarpinum hava tey gjørt av at senda í 14 tímar frá hesi rásini.

Eini 10 til 15 túsund føroyingar síggja rásina, metir The God Channel.

Stjórin í deildini hjá God Channel í skandinavia, Simon Jacobsen, vitjar í Føroyum í døgunum 23. til 27. oktober. Hævi verður hjá áhugaðum at hoyra spennandi søguna um God Channel á fleiri fundum.

God TV kundi halda 10 ára stovningardag 1. oktober í ár. Í 1995 byrjaðu Rory og Wendy Alec The God Channel í Onglandi og sendu tveir tímar við kristnum tilfari um alt Europa um fylgisvein. Í dag verður rásin send úr Ísrael til 15 fylgisveinar og til fleiri enn 200 lond. Høvuðsskrivstovan er í Washington, meðan smærri skrivstovur eru kring knøttin.

God TV samstarvar við meingheitir og kirkjur um allan heim.

# Pleaser í baðianstaltinum

Føroyskt/danski bólkurin við støði í Slagelse Pleaser, fer mikukvøldið á pallin í Slagelse Musikhus, Bdeanstalten at hita upp fyri danska bólkin Grand Avenue, sum er komin heim úr New York at spæla nakrar konsertir.

Pleaser við skálvíksbrøðrunum Arngrími og Jens Jakobsen, var herfyri við í semifinaluni í kappingini Live Contest, ið fyrr æt DM í Rock, men megnaðu ikki at sleppa víðari í finaluna í kappingini, sum bólkar sum Dizzy Mizz Lizzy, Kashmir, Passion Orange og Baal hava vunnið fyrr.

**nud**